# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 2<br>Tíð: 11. februar 2013 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir býráðslimir</td><td>Ikki á Fundi:</td></tr>
</table>

**1) Mál nr.: 13/00014 Roknskapur 2012 og Fíggjarætlan 2014 fyri Vágs Bókasavn**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, til staðfestingar Roknskapin 2012 og Fíggjarætlanina 2014 fyri Vágs Bókasavn. Seinasta freist at lata inn Roknskapin var 31. januar 2013, grunda á hetta var heitt á býráðslimir um at góðkenna umvegis teldupost.

**Avgerð:**
Staðfest at býráðið góðkennir roknskapin 2012 og fíggjarætlan 2014 fyri Vágs Bókasavn.

**2) Mál nr.: 13/00042** Ætlaði vegurin Geilin/Toftabrekka

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, skriv dagfest 29. januar 2013 frá Teknisku nevnd.
Tekniska nevnd vísir á, at Vágs kommuna fleiri ferðir hevur vent sær til eigarar av lendi hvar ætlaði vegurin skal ganga, nakrir eigarar eri sinnaðir at lata lendi meðan aðrir ikki.
Tekniska nevnd heitir nú á býráðið um, at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við ætlaða vegastrekkinum, ella taka vegin úr býarætlanini/býarskipanini.

**Avgerð:**
Vágs býráð er samt um, at hetta prosjekt avgjørt ikki er slept, men sum støðan og útlitini er beint nú, verður hetta nokk ikki eitt prosjekt kommunan fer i gongd við í hesum valskeiðið.
Ætlaða vegaføringin letur seg nokk ikki gera grunda á, at fleiri av eigarunum ikki ynskja at lata jørð hertil.
Býráðið er tó sinnað, at taka hetta upp aftur í samband við at býarskipanin skal endurskoðast nú í 2013.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00034** Garðurin hjá Frelsunarherinum, Eykajáttan fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðvíkjandi garði hjá Frelsunarherinum. Á fundi 17. desember samtykti býráðið einmælt, at mæla komandi býráð til at bjóða frelsunarherinum at gera garðin oman og niðan (vestanfyri), eftir fyriliggjandi uppskotið frá Teknisku deild. Og at kommunan hereftir verður leys av gjørdu avtaluni um garð niðanfyri (sunnantil).

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at beina málið aftur i Teknisku nevnd.

**4) Mál nr.: 13/00036** Eykajáttan til Vágs Havn, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, umbøn frá Havnanevndini um eina eykajáttan uppá 1 mió. kr. til Vágs Havn. Eykajáttanin skal nýtast til tað arbeiðið, sum er neyðugt í samband við at Norrøna kemur at sigla á Vág, meðan Smyril er til eftirlit.
Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundi 4. februar, at mæla til at játta hetta av innistandandi. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játta hetta av innistandandi.

**5) Mál nr.: 13/00047** Stuðul til langhylin, Eykajáttan fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umbøn um útgjald av stuðli til langhylin.
Býráðið hevur áður játta at veita stuðul til verkætlanina og mælir fíggjarleiðarin til, at stuðulin bert veður útgoldin sum aconto gjøld og eftir áheitan frá sjálvsognarstovninum, og hædd má altíð takast fyri tøka peninginum hjá Kommununi.
Fíggjarnevndin samtykt á fundi 4. februar, at mæla býráðnum til at játta 600.000,00 kr. sum eykajáttan av innistandandi í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini, metti seg ógegnigan. Eydis Kjærbo, varaborgarstjóri leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 13/00048** Eykajáttan til arbeiði í Grøna Bólki, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini um, at játta 100.000,00 kr. av innistandandi til arbeiðið hjá Grøna Bólki í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**7) Mál nr.: 13/00049** Eykajáttan til skeið luttøku, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini um at Vágs kommuna luttekur á skeiðinum sum KSF skipar fyri í døgunum 4 til 8 mars 2013 fyri teimum nývaldu kommunustýrinum og at játta 150.000,00 kr. av innistandandi til endamálið. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**8) Mál nr.: 13/00037** Eykajáttan til ger av spæliplássi í Vágs skúla, fyrra viðgerð.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá undanfarna býráð, um at nýta tann peningin sum oyramerktur er til ung (sum gávur á 100 ára haldinum hjá Vágs kommunu) til ger av spæliplássi við Vágs skúla. Eingin játtan fyriliggur í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**9) Mál nr.: 13/00021** Innkalling til eykaaðalfund hjá SEV

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram innkalling dagfest 14. januar 2013 til eykaaðalfundin hjá SEV. Eydis Kjærbo og Dennis Holm luttaka vegna Vágs kommunu.

**Avgerð:**
Kunnað.

Undirskriva:

**10) Mál nr.: 13/00052** Kommunustýrisskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til kommunustýrisskipan fyri Vágs kommunu.
Sambært kommunustýrislógini §5 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**11) Mál nr.: 13/00053** Fundarskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til fundarskipan fyri Vágs kommunu.
Sambært kommunustýrislógini §5 stk. 3 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um sína málsmannagongd í eini fundarskipan.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**12) Mál nr.: 13/00055** Starvsfólkaskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til starvsfólkaskipan fyri Vágs kommunu.
Sambært kommunustýrislógini §5 stk. 4 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eini starvsfólkaskipan.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**13) Mál nr.: 13/00054** val av umboðum

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan um at velja umboð í:
Vágs Ítróttarráð: ein eykalim
Barnaverndarnevndina: ein eykalim
Sjálvsognarstovnurin Vágs Brand- og bjargingarstøð: ein lim sum er formaður.
Ferðslunevndin: kunnað um at Johannes Magnussen heldur áfram.
Upptøkunevndin fyri Hamragarði: er vald fyri 2011 til 2014; Vígdis Nolsøe er umboð.

Undirskriva:

**Avgerð:**
Uppskot um at Curt Nolsøe verður valdur sum eykalimur í Vágs Ítróttarráð.
Einmælt samtykt.

Uppskot um at Maud Benjardøgg verður vald sum eykalimur í Barnaverndarnevndina.
Einmælt samtykt.

Uppskot um at velja Danjal Bjarkhamar sum lim í Sjálvsognarstovnin Vágs Brand- og bjargingarstøð.
Einmælt samtykt.

Kunnað var um hvussu upptøkunevndin fyri Hamragarð er vald.

Undirskriva: